

*Endashowið hjá All That Rain til undanumfarið til Prix Fo í Klaksvík. Regn og fýrverk*



*Týr trinu uppá gólv í studionum PUK studio*

Tónleikur 2001:

# Tónleikalívið í orðum og myndum



**Savna pening inn...?**

Torgið í SMS hevur verið gott mið hjá mongum í mong ár. Og hetta verður tað helst framvegis. Men nú mugu áhuga- og ítróttarfeløg, skúlaflokkar og onnur søkja um loyvi, at hava inntøkufremjandi tiltøk á Torginum í SMS í 2002.
Greiðið frá, hvat innkomni peningurin skal nýtast til, hvat inntøkufremjandi tiltak, tit ætla at skipa fyri, og hvat spennandi tiltak ella framsýning - sum fær enn meir fólk inn í SMS - tit hava ætlanir um at hava.
Nýtið hugflogið og verðið skapandi. Tey mest spennandi tiltøkini verða vald út.

Eru ivamál, ber til at ringja á tel. 35 88 80.

*Umsóknir skulu sendast til SMF, Postboks 1059, 110 Tórshavn.*
*Seinasta freist at lata inn umsókn er 15. desembur 2001.*

SMS

**Í dag er móttøka í 3´aranum í sambandi við, at útgivin er higartil fyrsta og einasta tónleikaárbókin í Føroyum. Bókin er ein samanumtøka hendingum innan tónleikalívið í Føroyum seinasta árið**

ÚTGÁVA
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Bókin "Tónleikur 2001"*

Tiltakið, sum flest øll fólk helst seta í samband við ár 2001 man verða Prix Føroyar. Og jú, sjálvandi, Prix Føroyar er tað heilt stóra innan tónleikaheimin í Føroyum, men als ikki tað einasta.

– Árið í ár hevur verið eitt ógvuliga hendingaríkt og forvitnisligt ár innan føroyska tónleikaheimin, sigur Eyðun Klakstein, sum er ein av teimum, sum hevur lagt bókina til rættis.

– Nógv er hent, nógvir bólkar hava verið uttanlands og spælt, og eisini hava nógvir útlendskir bólkar verið í Føroyum. Tí haldi eg, at tónleikalívið í Føroyum hevur uppiborið eina árbók.

Hugskotið til bókina kemur frá heimasíðuni pop.fo, sum hevur lagt seg eftir tónleikatíðindaflutningi innan føroyska tónleikaheimin.

– Tað var í summar at byrjað varð at tosa um, at tað hevði verið stuttligt at samla alt tilfarið saman til eina samlaða mynd av tí, sum er hent innan tónleik í Føroyum.

## Møguliga eftirfylgjarar

Og hvussu nú? Bókin er útkomin, men kunnu vit vænta fleiri slíkar?

– Um marknaðurin er fyri tí, ja, sigur Eyðun Klakstein.

– Uttanlands hevði tú fyrst kannað um marknaðurin var fyri eini slíkari bók, men tað verður ikki gjørt í Føroyum, her loypur tú bara útí tað, og er tað tað, sum vit hava gjørt. Vit hava lagt okkum eftir at stíla breitt, sjálvt um bókin bert er um tónleik. Mest poppur og rockur er í bókini, men eisini ymiskt annað hevur fingið sítt pláss.

Eyðun sigur seg vera ógvuliga glaðan fyri úrslitið. Nógv arbeiðið er lagt í bókina, men tað hevur ongan týdning. Fólk síggja ikki arbeiðið, sum liggur aftanfyri, tí er tað týdningarmikið, at úrslitið er so gott sum møguligt.

– Nú er spurningurin bara um fólk taka ímóti bókini. Um undirtøkan verður nóg góð, so verður uttan iva farið undir eina slíka bók aftur næsta ár. Tónleikalívið í Føroyum er ríkt og hendingarnar nógvar, so trupulleikin liggur ikki í at savna saman tilfar.

## Gott úrslit

Tónleikur 2001 er 109 síður og eru allar síðurnar í litum. Nógvar góðar myndir eru í bókini, og ger tað bókina lætta, bæði at lesa og at blaða ígjøgnum.

Bókin hevur bæði langar og styttri greinar. Hon byggir á tað, sum er skrivað um tónleik í Sosialinum og á pop.fo seinasta árið, men er meginparturin av tilfarinum endurskrivaður.

Aftast í bókini er eitt yvirlit yvir útvaldar tónleikahendingar 2001, og at enda er eitt yvirlit yvir tær føroysku fløgurnar, sum eru komnar út higartil í ár.

Hestprent hevur staðið fyri umbróting og prenting. Bókin kostar 159 krónur, og er avgjørt eitt gott hugskot í jólagávu til ein og hvønn, ið er áhugaður í tónleiki á ein ella annan hátt – um hann spælir, ger, lurtar ella bara er forvitin kann verða líkamikið.



*Terji Skibenæs, fyrrverandi gittarspælari í Flux*



# Fyrimyndarligt samstarv við oljufeløgini




*Sue Philbrow, skrivstovustjóri hjá Thor í Hósvík var sera væl nøgd við samvinnuna við stóru oljufeløgini í sambandi við fyrstu boringarnar á føroyskum øki*

*Mynd Jan Müller*

**-Vit hava havt eitt sera gott og positivt samstarv við stóru oljufeløgini í hesum fyrsta leitiskeiðnum á føroyskum øki. Tey hava verið ómetaliga hjálpsom og hava víst vilja til at hjálpa í allar hugsandi mátar. Thor hevur fingið nógv burtur úr hesum samstarvi segði Sue Philbrow, frá frálandareiðaríinum Thor í Hósvík á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum**

OLJULEITING OG VIRKSEMI
*Jan Müller*

Tað vóru ikki bara ónøgdar føroyskar fyritøkur umboðaðar á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í vikuni. Ein av fyritøkunum, Thor Offshore Services í Hósvík hevði mótvegis PAM Offshore Services, bara gott at bera oljufeløgunum. Sue Philbrow, skrivstovustjóri hjá felagnum, hevði eina sera áhugaverda framløgu, har greitt varð frá felagnum Thor, sum frá at vera ein fiskivinnufyritøka meira og meira er vorðin ein frálandafyritøka. Felagið varð stovnað í ringu tíðunum í 1994 og varð fyrsta skipið fiskibáturin Thor. Sama skip var eisini tað fyrsta hjá felagnum at útinna frálandauppgávur í føroyskum sjógvi fyri seismikkfelagið Fugro Geoteam. Í 1997 varð avgjørt at keypa Tórsvík fyri at gerast minni bundin av fiskivinnuni. Síðani gekk slag í slag, og felagið fekk eisini øll tey neyðugu sertifikatini og loyvini til at kunna arbeiða í frálandavinnuni, bæði her heima og úti á heimsins høvum.

- Hetta var ein dýr gongd, men vit halda, at hon var røtt segði Sue Philbrow. Í juli í ár varð so enn eitt avgerandi stig tikið, tá samvinna varð tikin upp við kenda og roynda Esvagt í Esbjerg við støði í tí sera vælútgjørda og nútímans frálandaskipinum Faroe Connector. Hetta var so ein nýggj roynd hjá felagnum at koma longur enn bara at hava vaktar- og hjálparskip. Seinasta íløgan hjá felagnum er Thor Supporter, eitt útgerðarskip, sum í eisini skal arbeiða burturav í frálandavinnuni. Skipið verður nú gjørt út í Singapore og skal virka í Indiska havinum. Skipini hjá Thor arbeiða nógva staðni, eitt nú vestan fyri Hetland, í Norðsjónum og í Afrika.

Felagið, sum byrjaði sum reiðarí fyri fiskiskip, er nú meira reiðarí fyri skip í oljuvinnuni. Sue Philbrow vísti á, at meðan fyritøkan í 1994 arbeiddi burturav í fiskivinnuni stava 65,5% av virkseminum í ár frá frálandavinnuni. Fyritøkan er eisini nógv vaksin hesi árini. Í 1994 hevði fyritøkan 17 fólk í arbeiði. Í dag er talið 87. Men tað hava eisini verið nógvir trupulleikar á leiðini segði Thorstjórin í síni framløgu. Tað hevur m.a. verið torført at áseta lønirnar við løntakarafeløgini og helt hon tað vera mangul uppá forstáilsi frá løntakarafeløgunum at luttaka í menningini av eini føroyskari fdrálandavinnu.

Hon vísti eisini á ein annan trupulleika. Nevniliga tann, at føroysk sjófólk høvdu verið noydd til at taka trygdarsekið í útlandinum, sum gjørdi tað nógv dýrari. Eisini helt hon, at skattingin hevur verið trupul, ógreið og ikki kappingarfør.

## Positivt

Men síggja vit burtur frá trupulleikunum, so hevur alt samstarv við stóru oljufeløgini verið positivt. – Tey hava verið ómetaliga hjálpsom og hava bara víst vilja til at hjálpa í allar hugsandi mátar, og eg haldi, at vit hava fingið nógv burtur úr hesum samstarvi.

Hon vísti at enda á, hvat Thor Offshore Services hevur fingið burtur úr í hesum fyrsta leititskeiðinum. Frálandaskipini hjá felagnum hava havt úr at gera, og nú boringarnar eru lidnar á landgrunninum er flaggskipið í Thor-flotanum, Faroe Connector leigað til BP at arbeiða vestan fyri Hetland.



*Flaggskipið hjá Thor (ESVAGT-THOR) er Faroe Connector, sum hevur arbeitt á landgrunninum í ár við nærum føroyskari manning burturav*

*Mynd Jan Müller*